# Klænka teg við kostinum

TÍÐINDASKRIV

Í morgin klokkan 14 skipar In Tone Clinic fyri tiltaki, har tú kanst hoyra um tær ymisku viðgerðirnar, tey hava og um, hvønn týdning kostur hevur, um tú ynskir at klænka teg. Vilt tú klænka teg og samstundis hava ein fastari kropp, er hettar nakað fyri teg, sigur Jana Ejdesgaard Thomsen frá In Tone.

Hon sigur, at tey skjótastu og bestu úrslitini í samband við kropsformning, vøddavenjing, slanking, og feittforbrenning, ført tú í InTone, har tey eisini bjóða aðrar viðgerðir so sum massagu, kokubotnavenjingar og andlitsviðgerðir og mangt annað.

Viðgerðin tekur ½ tíma við elektroniskari biostimulatión, tað eru signalir, sum líkjast mest vanligari venjing, men er bara nógv meira virkin.

Ein viðgerð svarar til sjey tímar venjing ella 400 vøddavenjingar.

Menn eru eisini vælkomnir, teir vilja vit eisini hava slankar og flottar.

- Vit bjóða okkum eisini at koma út til bindiklubbar, mammubólkar, mannfólkakvøld, arbeiðspláss og onnur sum hava áhuga, at greiða frá tí sum vit gera, sigur hon.

Leygardagin greiðir Sanna Hentze frá um Intone, hon hevur útbúgving í kosti, motión, heilsu og er zoneterapeut.

Jana Ejdesgaard Thomsen er útbúgvin økonoma og hevur arbeitt við Fitness í 21 ár.

Hon er nú LR umboð og greiðir frá um FiguAktiv slankiískoyti og um kost.

Til ber at melda seg til tiltakið hjá Janu á tel 517100 ella hjá Sannu á tel 516114 áðrenn kl. 12.00 leygardagin.


# IRF SØKIR EFTIR ÁGRÝTNUM OG FRAMSKYGDUM RAKSTRARLEIÐARA

**STARVIÐ**

Talan er um eitt nýtt og spennandi starv sum rakstrarleiðari hjá IRF. Ert tú ein støðugur, ábyrgdarfullur og samstarvsfúsur leiðari, so ert tú tann, sum vit leita eftir.

Sum rakstrarleiðari hevur tú beinleiðis tilvísing til stjóran og verður eisini partur av leiðslutoyminum hjá IRF, har opinleiki og virðing eru týðandi partar av gerandisdegnum. Samstundis skalt tú vera við til framhaldandi at tryggja positivu gongdina hjá IRF saman við leiðslu, deildarleiðarum og starvsfólkum annars. Tú kemur eisini í ávísan mun at vera við á nevndarfundum hjá IRF.

Títt yvirskipaða ábyrgdarøki verður at hava rakstrarligu og teknisku ábyrgdina av øllum rakstrarstøðum, bilum og bingjum hjá IRF.

**PERSÓNLIGIR FØRLEIKAR**

- Tú virðir tað at finna røttu loysnina, grundað á nágreiniligar fyrireikingar, har alt upplýsingartilfar verður savnað og útgreinað.
- Tú hevur gott yvirlit og metir um einstøku støðuna út frá veruleikanum.
- Tær dámar væl at síggja úrslit í mun til tey mál, sum verða sett.
- Tú ert ein persónur, sum regluliga eftirmetir úrslitini og hyggur at, um tingini kunnu gerast betri, smartari, skjótari o.a.
- Tú dugir at savna deildarleiðarar og starvsfólk um felags virðir og tryggjar harvið eitt støðugt liðavrik.

**YRKISLIGIR FØRLEIKAR**

- Hægri útbúgving í verkfrøði ella aðrari yrkisgrein, umframt royndir.
- Góðan teldukunnleika.
- Góðan kunnleika til rakstur í nútíðar rakstrareindum.
- Leiðsluroyndir frá líknandi starvi.
- Gjarna kunnleika til verkætlanarstýring og tað at arbeiða við tilboðum.
- Kunnleiki til dygdarstýring, umhvørvi og viðgerð av burturkasti er ein fyrimunur.

**VIT VÆNTA EISINI, AT TÚ MEGNAR AT:**

- Fremja broytingar og menning av felagsskapinum.
- Tryggja dygd og effektivitet í uppgávunum í gerandisdegnum.
- Tryggja eina støðuga yrkisliga menning av økinum.
- Fremja sjónliga leiðslu.

**SETANAR- OG LØNARTREYTIR**

Starvið verður sett frá 1. januar 2009 ella skjótast til ber og lønt sambært sáttmála við avvarðandi yrkisfelag ella eftir avtalu.

**UMSÓKN**

Umsókn við prógvum, c.v. og øðrum viðkomandi skjølum skulu sendast til:
IRF, Postboks 39, 520 Leirvík ella til irf@irf.fo.

Umsóknin skal vera IRF í hendi í seinasta lagi mánadagin 27. oktober 2008 kl. 12.00.

Vilt tú hava fleiri upplýsingar, kanst tú ringja til Poul Andrias Joensen, stjóra, á tlf.: 234210. Víst verður eisini til heimasíðuna hjá IRF: www.irf.fo.

IRF er ein interkommunalur felagsskapur við 33 limakommunum. IRF tekur ímóti øllum ruski og burturkasti frá húsarhaldum, virkjum og stovnum í limakommununum.

IRF rekur brennistøð, skiljihøll, spilloljuverk, umlastingarstøðir, rottangapláss og tyrvingarpláss. Øll pláss skulu hava umhvørvisgóðkenning. IRF hevur umleið 20 serútgjørdar bilar til flutning av burturkasti og til at taka sær av rottangatøming og reinsing av spillivatnsleiðingum o.ø. Umleið 65 fólk eru í starvi hjá IRF.

IRF

IRF · Hagaleiti · FO-520 Leirvík · tlf. 414243 · www.irf.fo

SENDISTOVAN